# Eg havi altíð stuðlað Norðoyggjum

GERHARD LOGNBERG
løgtingsmaður



Nú skrivar Norðlýsið, at tað er skeivt av mær at harta Aksel W. Johannesen fyri at leggja umsitingina av sjúkratryggingini til Klaksvíkar. Og leggur afturat, at norðoyaløgtingsmenn eru positivir fyri Sandoyartunlinum.

Eg skal beinanvegin vera samdur í tí, at norðoyatingmenn hava staðið saman við mær við Sandoyartunlinum. Eg biði og hopi, at vit koma á mál við hesum, sum er altavgerðandi fyri suðurøkið í Føroyum.

**Norðoyggjar**

Norðlýsið eigur ikki at gloyma, at nettupp Gerhard Lognberg hevur arbeitt hart fyri trygdarmiðstøðini og stuðlað norðoya tingmonnum í øllum málum norðoyggja til frama. Ikki minst tá fiskidagar hava verið fyri, jú eg havi gott vinarlag við norðoyatingmenn.

Eitt heilt annað er, gekk Aksel V Johannesen heldur ivasamt um sannleikan, tá hann á middegi í dag segði, at hann hevði ikki hoyrt, at umsitingin hjá sjúkratrygdini skuldi leggjast í Sandoynna. Tað passaði ikki sum Aksel segði, tí eg fekk at vita, fyri tað fyrsta, stóð hetta mál ikki á skrá fyri fundin.

Tá Aksel bar hetta upp á mál, segði formaðurin í tingbólkinum John Johannesen við Aksel, at munnlig avtala var at henda umsiting skuldi liggja í Sandoynni. Hann segði víðari, at hetta fór Gerhard ikki at góðtaka, men landsstýrismaðurin hevur síðsta orðið.

Heilt erligt, hvat er meiningin.

1. Skrivstovan hjá Taks varð niðurløgd fyrst í hesum árinum og løgd í Norðoyggjar. 3 arbeiðspláss.
2. Talan er um at niðurleggja kynsbótastøðina í Skopun. 5 arbeiðspláss.
3. Sandoyartunnilin.
4. Havnin í Skúvoy.

So eg hopi, at norðoyggjar skilja mína støðu og ynski eg norðoyggjum alt tað besta, men tann viðferð, Sandoyggin fær, er undir alt lámark.

Tá talan hevur verið um kommunuálitið, ja tá vóru serfrøðingar, um teir kunnu kallast so, samdir í at Sandoy skuldi fáa neyðhjálp.

Vit hava brúk fyri almennum arbeiðsplássum, so fólk við útbúgving flyta aftur í Sandoynna.

# Góði Hans Pauli Strøm

SIGVALD KRISTIANSEN
formaður í Landsfelag Pensjónista



Tað er ikki lukkuligt, sum tú leikar í móti Landsfelag Pensjónista um okkara spakføra mótmæli-áheitan viðvíkjandi lógaruppskotinum um heilsutrygd.

Lat meg siga beinanvegin, at vit kendu einki til uppskotið, hava ikki havt tað til hoyringar, sum eg skilji á tær, at onnur hava havt møguleika fyri.

Grundin til áheitanina var – sum tað stendur í skrivinum – at landsstýrismaðurin í heilsumálum boðaði í Útvarpinum frá, at nýggja skipanin við Heilsutrygd, ið ætlandi skal setast í gildi hin 1. januar 2010, **ikki verður skattafíggjað við samhaldsføstum, prosentvísum gjaldi fyrstu árini.**

Tað hevur, sum tú skrivar, í áravís verið tosað um at broyta sjúkrakassaskipanina, soleiðis at fíggingin fór yvir skattaskipanina, tað hava vit eisini fleiri ferðir ført fram á fundum við landsstýrismannin í heilsumálum, og semja hevur verið um at fáa hesa skipan í lag so skjótt sum møguligt, og tað er fleiri ferðir sett dato á, nær limagjaldið til sjúkrakassarnar fór at halda uppat, hetta fór at vera ein stórur lætti hjá teimum pensjónistum, sum eru ringast fyri. Men hetta er útsett fleiri ferðir, og nú eisini eftir at lógin skal fáa gildi frá 1. jan. 2010. **Tað sum fyrst kemur í drag, kemur seinni í lag**, hetta hava vit upplivað so ofta, tí sendu vit hatta mótmæli og áheitan.

Nú hava vit fingið eitt sindur meira at vita um lógaruppskotið í tínum harðligu viðmerkingum og frá landsstýrismanninum í heilsumálum, sum hevur grein í bløðunum um hesa nýggju samhaldsføstu sjúkratrygging. Landsfelag Pensjónista fegnast um, at lógaruppskotið um heilsutrygd nú verður lagt fram, og sum eg skilji av tí, sum er ført fram, so verður hetta ein stórur bati fyri øll viðvíkjandi heilsutrygging, sum vit í Landsfelag Pensjónista kunnu taka fult undir við. Vit hava í okkara áheitan ikki sagt eitt orð um innihaldið í lógaruppskotinum, bert peikað á tað, sum flestu pensjónistar høvdu væntað, at sjúkrakassagjaldið skuldi fella burtur í seinasta lagi komandi ár. Nú verður tað hjá nógvum hægri enn tað var áður.

Landsfelag Pensjónista hevur havt eitt gott samarbeiði við teg, Hans Pauli, og okkara fatan hevur verið, at tú í nógvum førum hevur tikið undir við og stuðlað okkara sjónarmiðum. Niðurgerðingin av Landsfelagnum í grein tíni harmar meg almikið, tí nevndin í Landsfelagnum hevur seinastu árini miðvíst roynt at gera seg galdandi í samfelagnum og fáa ávirkan á politiska økinum til frama fyri pensjónistarnar, og tá hava vit hugsað eina mest um teir pensjónistar, sum eru ringast fyri, og tað er eisini tað, sum tú hevur roynt í tínum politiska arbeiði.

# Fiskimaðurin verður raðfestur fremst

JAN HØJGAARD



Nevndarfundir hjá FF eru javnan til viðgerðar í fjølmiðlunum, hvør tað so er, ið lekur. Afturgangandi hjá ávísum høvunda er, hvussu ræðuligur formaðurin í fiskimannafelagnum er.

Tann største brotsgerðin formaðurin hevur gjørt var at stilla upp til formansvalið og blíva valdur. At hugsa sær, at ein vanligur fiskimaður hevði tann frekleika at bjóða seg fram sum formansvalevni fyri fiskimenn hevur fallið ávísum persónum fyri bróstið.

Hesir persónar hava í áravís snobbað uppeftir, og hava í áravís lograð við halanum, tá teir eru klappaðir á ryggin av reiðarum, bankum, tryggingarfeløgum og øðrum, sum kunnu hugsast at hava áhugamál í tí, sum fiskimenn forvinna. Hesi herðaklapp hava eftir øllum meir at týða fyri teir, enn at bøta um kor fiskimanna.

Hesar kreftir hava av fullum huga arbeitt ímóti, at nakað munadygt kann vera gjørt fyri okkara fiskimenn. Hvørja ferð vit hava viðgjørt eitt sáttmálabrot í nevndini, er tað eldur í hjá sama høvunda. Hann oysir út av fullum hjarta í bløðum, um hvussu ljótt tað er arbeiða fyri fiskimannin, og hvussu ljótt tað er at finnast at hansara hávirdu reiðarum.

**Arbeiða fyri fiskimannin**

Men eg kann siga sama høvunda, at eg lati ikki eyguni aftur, tá eg gerist varugur við eitt sáttmálabrot. Tað hava fiskimenn fingið nokk av, og vilja gera nakað við tað. Fiskimenn hava tolt nógv gjøgnum árini, tað er heilt víst. Nú Føroya Fiskimannafelag er um at fáa glið á, er tað sum um ein vissur er leysur.

Nei hann sjálvur, tað eru ikki allir, sum taka eitt herðaklapp fram um kor fiskimanna. Í tveimum førum hevur nevndin í Føroya Fiskimannafelag staðið móti stórum trýsti til sáttmálasamráðingarnar. Vit hava ikki slaka ein tumma, hóast tað hevur slitna millum partarnar.

Vit hava prógvað, at vit nú hava dirvi at samráðast undir stórum trýsti uttan at slaka sjálvandi.

**Sáttmálabrot ikki góðtikin**

Tá eg var í 40 ára føðingardegi hjá einum fiskimanni, sum noktaði at góðtaka sáttmálabrot móti honum, hugdi eg yvir á fiskimenninar, sum har sótu.

Hesir mergjaðu menn vóru vit gott treysti, eg sá tað týðuliga, og tað var ongin ivi í míni sál, at hesir menn vóru til reiðar at stríðast, og teir koma eisini at vinna sigur. So hann sjálvur, lat nú fiskimenn fáa frið.

Men tað hevur kostað nógv persónliga at verja fiskimannin. Eg havið verið ærumeiddur og bakbitin óteljandi ferðir. Eg havið verið hóttur og lagdur undir trýst, sum kundi fingið sjálvt tey sterkastu at tikið beinini upp á nakkan. Men til tað vil eg siga, at eg beri hvørt bakbit, og hvørja hóttan við stórari virðing, tí tað taki eg sum eitt tekin um, at vit eru á rættari kós.

Við stórari virðing fyri fiskimanninum.

## Íverksetara-háskúli í Miðlahúsinum

**Í samstarvi við Europaháskúlanum á Kaløí Jútlandi skipar Fundamentor við Palla Højsholt og Boga Eliasen fyri 3 mánaðar háskúlaskúlaskeiði um íverksetan, sum er tað fysta av sínum slag í Danmark. Mikudagin verður kunnað um hetta í Miðlahúsinum í Vágsbotni**

ÍVERKSETAN
*Tíðindaskriv*

Í hesum sambandi verður kunnandi fundur í Miðlahúsinum komandi mikudag, har tosað verður um skúlan, eins og kjak um íverksetan er á skránni.

Endamálið við sjálvum skeiðnum er at ung, sum hava áhuga fyri íverksetan og/ella hava eitt gott hugskot tey kundu hugsað sær at ment, fáa grundleggjandi førleikar til at byrja egið virksemi.

Í 3 mánaðar skapa vit eitt fundament fyri, og verða mentorar hjá, ungu fólkunum, sum taka hetta stóra stigið á íverksetaraleið.

Við opnari og erligari sparring og teimum neyðugu karmunum verða allir skeiðsluttakararnir fyrireikaðir til avbjóðingarnar í vinnulívinum.

- Heimurin er opin fyri øllum, sum hava viljan í hjartanum, ert tú ein teirra?
- Hevur tú góða hugskotið?
- Hevur tú dirvið at royna hugskotið?
- Brennir tú fyri at gerast íverkseti?
- Ynskir tú frælsi og framtíð sum harri í egnum húsið?
- Ynskir tú meira vitan og trygd?
- Leitar tú eftir einum toymi, netverki ella fleiri samstarvspartnarum?
- Vil tú stríðast fyri at standa á odda og fáa succes?

Um ein av omanfyrinevndu spurningum hóskar til tín er skeiðið ein góður møguleiki fyri at nærkast tínum dreymum.

**Skeiðið**:
Skeiðið verður á vakra Europaháskúlanum á Djursland, har skeiðluttakararnir eisini kunnu búgva. Serligur avsláttur verður givin føroyskum luttakarum.

**Skeiðið er skipað í fýra partar:**

- Nágreinan og veruleikagerð av hugskoti, uppfinning ella tí tú vilt.
- Persónlig avkláran, menning av sterkum og veikum síðum
- Grundleggjandi innlit í byrjan av vinnuvirksemi, rakstur, vøkstur og praktiskt uppfylgjandi arbeiði eftir byrjan av virksemi.
- Altavgerðandi samrenningin av góðsku, service, marknaðarføring og sølu.

DEKKMASTER.FO
195/65-15
kr. 990,-
ADAC Testvinnari
...tá ið prísurin eisini er avgerandi!
www.dekkmaster.fo · info@dekkmaster.fo · tel. 227 000
Bestu vetrardekkini
og bestu prísirnir
FDM Testvinnari
Bæði FDM og týska felagið ADAC kosu Conti Winter Contact TS830 sum besta vetrardekkið í sínum flokki
ContiWinterContact
175/65-14 ........ 880,-
185/65-15 ........ 950,-
195/65-15 ........ 990,-
205/55-16 ..... 1.290,-

